# So kom fyrsta videoleikbannið

**Bæði Magni Mohr og Bergur Midjord fingu leikbann, eftir at kappingarnevndin hjá FSF hevði hugt at sjónbandaupptøkum frá dystinum millum TB og B36**

LEIKBANN
*Jákup Mørk*

Kappingarnevndin hjá FSF hevði mikukvøldið fund, og millum viðgjørdu málini vóru hendingarnar í dystinum á Sevmýri millum TB og B36

Sum so var talan um trý mál, sum hesaferð komu til viðgerðar í einum. Í fyrstu atløgu skuldi kappingarnevndin taka støðu til, hvussu langt leikbannað hjá Jón Johannesen skuldi verða, eftir at hann varð rikin vøllinum fyri lítið sømuligan atburð. Í øðrum lagi skuldi nevndin gera av, hvørt hon - fyri fyrstu ferð - skuldi geva leikbann, grundað á videoupptøkur. Og í triðja lagi skuldi avgerð takast um, um og hvørja revsing TB skuldi hava, aftur fyri at trygdarreglurnar kring dystin ikki vórðu fylgdar.

**Tríggjar dagar til Jón**

Fyri at taka tað fyrsta fyrst, so gjørdi nevndin av, at Jón Johannesen fær leikbann í tríggjar dagar fyri hendingina. At talan verður um tríggjar dagar, kemur neyvan heilt óvæntað á. Praksis hevur í ár verið, at verður reytt kort givið fyri hendingar, sum ikki henda í opnum spæli, so gevur tað ein dag eyka. Og í førinum við Jón verður talan um tveir eyka dagar. Fyrst fyri at tveita bóltin eftir B36-beinkinum, og síðani fyri at taka í Berg Midjord.

**Fyrsta sjónbandaleikbannið**

Orsøkin til alt rokið var tó, at Magni Mohr, sum er kropsligur venjari hjá B36, óneyðugt provokerar Jón, tá hesin skal taka innkast. Og í øðrum lagi sproytar Bergur Midjord vatn á Jón, sum síðani hevnir seg. Hetta framgekk týðiliga av myndunum, sum vórðu sýndar í 3-2 sendingini í Sjónvarpinum, og í ár hevur Kappingarnevndin so eisini heimild at nýta sjónbandaupptøkur, tá tey skulu meta um revsingar.

Og í so máta er hendingin á Sevmýri søgulig. Tí hóast dómarin ikki gav reytt kort til nakran á B36-beinkinum, so fær hetta leikbann við sær. Magni Mohr sleppur ikki at sita á beinkinum hjá B36 næsta dystin, sum er móti ÍF, tí hann fær ein dag leikbann fyri ósportligan atburð.

Hartil fær Bergur Midjord leikbann í tveir dystir. Hetta út frá regluni um, at hendingar, sum ikki ganga fyri seg í opnum spæli, verða revsaðar harðari enn annars.



*Bergur Midjord skrivaði mikukvøldið eitt petti av føroyskari fótbóltssøgu. Hann er fyrsti spælarin, sum er leikbannaður grundað á sjónbandaupptøkur - og uttan at hann hevur fingið kort frá dómaranum*

# Uppgradera gallakvøldið



*Tað verður Bygdarhúsið í Leirvík, sum verður karmur um gallaveitsluna hjá fótbóltinum í ár. Veitslan verður hildin 29. oktober*

**29. oktober verður aftur gallaveitsla fyri fótbóltin. Men fyri at gera kvøldið meira serligt, hava fyriskipararnir valt at broyta leistin nakað**

GALLAKVØLD
*Jákup Mørk*

Tað verður aftur GÍ, sum fer at skipa fyri gallaveitsluni hjá fótbóltinum. Kappingarárið endar 22. oktober, og leygardagin eftir hetta stendur so gallaveitslan á skránni. Ein veitsla, har spælarar, dómarar, venjarar og leiðarar annars hava høvi at hittast undir øðrvísi umstøðum enn teimum, sum eru galdandi á vøllinum. Og sjálvandi er tað so eisini kvøldið, har bestu spælararnir hjá kvinnum og monnum skulu heiðrast.

**Øðrvísi leistur**

Seinastu árini hevur GÍ hildið hetta kvøldið í Mentunarhúsinum í Fuglafirði, men tann leisturin verður so broyttur nakað í ár.

- Vit vilja í ár royna at skipa kvøldið nakað øðrvísi. Ikki minst, tí vit vilja uppgraderað støðið nakað, um tú kanst siga tað so, sigur Brandur Jacobsen, sum vegna GÍ er ein av teimum, sum fyrireika kvøldið.

- Fyrst og fremst, so verður tiltakið í ár hildið í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tá veitslan hevur verið í Fuglafirði, eru dyrnar lætnar upp fyri almenninginum, tá liðið er nakað út á kvøldið, men soleiðis verður tað ikki í ár. Tað er ein leistur, sum eitt nú hondbólturin hevur nýtt fleiri ferðir, og tað hevur riggað heilt væl, skilst.

- Hartil er so eisini ætlanin, at sjálv fyriskipanin skal vera á einum hægri støði. Talan verður um veruligan galldøgurða, soleiðis at tað alt fyri eitt sæst, at hetta er meira enn eitt vanligt kvøld í býnum, og yvir høvur kanst tú siga, at vónin við hesum er, at øll tey, sum taka lut á kvøldinum, soleiðis fáa eitt enn betri kvøld, enn tey áður hava havt. Eisini hóast hesi hava verið góð, sigur Brandur at enda.

# Eftirlitið skal herðast

**Kappingarnevndin revsaði TB við bót, tí felagið ikki hevur uppfylt trygdarreglurnar til dómarar. Men framyvir verður eftirlitið við regluni hert, og longu nú hava feløgini fingið boð um at stramma upp**

DÓMARATRYGD
*Jákup Mørk*

»Fleiri ferðir er tað so, at trygdarkrøvini verða fylgd undan dystinum - soleiðis at trygdarumboð er til staðar, tá dómarin kemur v.m. - og tí setir dómarin dystin í gongd. Men tá dysturin so er lokin, og dómarin skal fylgjast av vøllinum, er eingin at fylgja teimum út.«

Soleiðis stóð at lesa í mikudagsútgávu okkara, tá vit umrøddu hendingina, har dómarin varð mest sum álopin av óðum áskoðarum eftir dystin millum TB og B36 seinasta sunnudag.

Kappingarstjórin viðgekk eisini, at teir fleiri ferðir hava fingið frágreiðing frá dómarum um hesi viðurskifti, og fleiri ferðir hevur FSF eisini átalað feløgini fyri hetta. Skal metast eftir hendingini á Tvøroyri, so hava hesar átalurnar tó ikki verið nóg mikið, og dómurin við tilhoyrandi niðurstøðum ber eisini greið boð um, at tað av álvara verður strammað upp á økinum.

**Broytingar longu sunnudagin**

Niðurstøðan hjá kappingarnevndini á fundinum mikudagin var, at TB skal hava eina bót á 10.000 kr. fyri tilburðin eftir dystin. Hetta er ein revsing, sum svara til hana, sum KÍ fekk í 2001, tá ein linjuverji varð sligin av áskoðara.

Hóast hendingarnar sum so eru meinlíkar, so er tó ein avgerandi munur, um støða skal takast til revsingina. Trygdarreglurnar viðvíkjandi dómarum komu nevnliga sum ein avleiðing av tilburðinum í Klaksvík. Tí hevði KÍ sum so ikki nøkur formlig trygdarkrøv at halda seg til. Tað høvdu tvøramenn sunnudagin, og tí vóru fleiri, sum roknaðu við, at Kappingarnevndin fór at gera nýtslu av revsimøguleikanum at frátaka felagnum heimavøll í ein ella fleiri dystir.

Hinvegin hevur tað verið so sum so í uppfylgingini av trygdarreglunum, og spurdur beinleiðis um hetta, ásannar formaðurin í Kappingarnevndini, Bjarki Mohr, eisini, at dómurin skal síggjast í ljósinum av hesum.

- Tað kanst tú gott siga. Og í øllum førum ætla vit nú at gera greitt, at reglurnar skulu haldast.

Vil tað siga, at talan verður um meira enn bara eina átalu, um dómarin hevur nakað at finnast at í so máta.

- Tað verður tað helst. Feløgini skulu hava púrasta greitt at vita, at tað verður tolererað, tá reglurnar ikki verða hildnar, so talan verður heilt víst um eina uppstramman. Hartil verður tað longu frá komandi vikuskifti kravt, at trygdarumboðini hjá feløgunum skulu vera í eyðkennisbúnum, soleiðis at tað er lættari hjá bæði dómarum og øðrum at síggja, hvørja funktión tey hava, staðfestir Bjarki Mohr at enda.